fylgiskjal 10

Heilsu- og Innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO 110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 34 68 00
Fax +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail Sev@sev.fo

May. 28. 18
síða 1/1

**Viðmerkingar til Løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (Náttúrumargfeldislógin)**

Uppskot til Náttúrumargfeldislóg var sent til hoyring tann 6. apríl 2018, og hevur SEV niðanfyri standandi viðmerkingar til uppskotið:

Vísandi til § 56 í uppskotinum, ið snýr seg um, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um kæru, og at avgerðir eftir hesi lóg og reglum ásettum við heimild í hesi lóg, bert skulu kunna kærast til ávísa kærunevnd, er SEV av tí fatan, at greinað eigur at vera í lógini, hvussu kærunevndin er samansett, og at nevndin eigur at vera politiskt óheft.

Mælt verður tí til, at § 56 verður orðað við ásetingum um kæru, og hvussu kærunevndin verður mannað.

Tann nýggja lóggávan krevur eftir okkara fatan eina stóra umsiting, og verður spurnartekin sett við, um landið setir nokk av tilfeingi av til arbeiðið.

Í lógini § 38 stk. 2 verður víst til eina Planlóg, sum ikki er sett í gildi. Planlógin eigur at verða sett í gildi samstundis sum Náttúrumargfeldislógin.

Viðvíkjandi byggimálum, ið higartil hava verið avgreidd eftir náttúrufriðingar-lógini, tykist vera ógreitt hvussu málini verða avgreidd frameftir, har m.a. árinsmetingar verða kravdar eftir øðrum lóggávum.

Neyðugar kunngerðir eiga eisini at fylgja við lógini av tí, at ikki er greitt, hvørjar treytir verða galdandi.

Vinalig heilsan
Elfelagið SEV

Hákun Djurhuus,
stjóri